FØROYA REIÐARAFELAG

Tórshavn, 3. des. 2023

Hoyringarskriv til vinnunevndina ísv. broyting í sjófeingislógini viðvíkjandi brúkstreyt og brúksskyldu

Vinnunevndin hevur kallað Føroya Reiðarafelag inn til hoyring ísv. broytingar í sjófeingislógini viðvíkjandi brúkstreytini fyri at avhenda rættindi og brúksskylduni á veiði- og fiskiloyvi. Nakrar av viðmerkingunum hjá Reiðarafelagnum eru tiknar til eftirtektar, og hetta bøtir um uppskotið hjá Fiskimálaráðnum.

Tó verður framvegis skotið upp, at nakrar broytingar verða gjørdar. Talan er um eitt mál, ið hevur verið til viðgerðar við jøvnum millumbilum síðan 2017, og tað er ikki haldført, at hetta málið skal vera afturvendandi á hendan hátt. Umráðandi er eisini, at løgtingið samtykkir eitt uppskot áðrenn 1. januar 2024, tá ið galdandi reglur fáa avleiðingar fyri fleiri reiðarí.

Tann gamla 60%-reglan í lóg um vinnuligan fiskiskap fevndi bert um fyribils avhendingar av fiskidøgum undir Føroyum og kvotum av botnfiski undir Íslandi. Tískil er hendan 60%-reglan munandi meira inntrívandi í mun til gomlu regluna og farast má fram við varsemi.

Skotið verður í fyrsta lagi upp, at 60% treytin fyri avhending í §31, stk. 2 verður avmarkað til fyribils avhendingar av rættindum. Í løtuni er ásetingin galdandi fyri bæði fyribils og endaligar avhendingar, og ætlanin er at halda fram við tí. Á heysti 2022 varð skotið upp, at 60%-reglan bert verður galdandi fyri fyribils avhendingar, soleiðis at eingin avhendar somu rættindi ár eftir ár. Henda broyting átti at verið tikin fram aftur.

Somuleiðis eigur at vera greitt, at uppgerðin fyri 60%-regluna t.d. fevnir um allan fiskiskap eftir botnfiski í Barentshavinum. Á tann hátt fevnir uppgerðin um allan botnfisk í russiskum og norskum øki og við Svalbard. Hetta er ikki heilt greitt í viðmerkingunum.

Samstundis er ein ávísur vandi fyri, at summi rættindi verða gird inni, tí at loyvishavarin ikki hevur rætt til at avhenda vegna 60%-regluna. Trupult er at meta um allar avleiðingar av slíkum reglum, men fleiri kvotur og fiskidagar kunnu væntast at verða rakt av 60%-regluni og harvið verða innibyrgd hjá reiðaríum, sum síðani ikki kunnu avhenda. Ivasamt er samstundis, hvørjar av hesum kvotum og fiskidøgum høvdu fingið undantak við støði í treytunum í viðmerkingunum til §31, stk. 3 í uppskotinum.

Viðvíkjandi uppgerð av 60%-regluni vísa viðmerkingarnar til fiskiskap eftir makreli í Norðuratlantshavi, hóast makrelur er undantikin frá regluni. Tí er neyðugt at hyggja nærri eftir hesum viðmerkingum.

Viðvíkjandi undantøkum til §31 er heldur ógreitt, nær undantak verður latið fyri ávísan fiskiskap. Viðmerkingarnar siga, at undantøk kunnu gevast til ávísan fiskiskap, tá ið heildarkvotur smáar og smábýttar,

Boks 361 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 73 99 12 • Teldupostur: stefan@industry.fo

veiðibann er lýst ella at vánaligur fiskiskapur er staðfestur. Tó er ivasamt, hvat hugsað verður um, tá ið talan er um smáar kvotur.

Undantak verður t.d. ikki latið, tá ið ein kvota er á vanligum støði søguliga, men har einstøk fiskifør ikki hava møguleika fyri skynsomum rakstri, t.d. Flemish Cap. Toskafiskiskapurin á Flemish Cap fer væntandi at gerast ein avbjóðing, tí at undantakið fevnir ikki um tey árini, tá ið kvotan er á einum vanligum støði, men har kvoturnar eru smábýttar millum skipini.

Reiðarafelagið ger eisini vart við, at lóg um skatting av vinningi frá sølu av veiðirættindum eigur at verða avtikin ella broytt munandi. Hendan lógin ger tað trupult at avhenda rættindi og at tillaga flotan á skynsaman hátt. Í løtuni hevur hendan lógin sera óhepnar avleiðingar, har trupult er hjá fleiri reiðaríum at sleppa av við rættindi, og tað er trupult hjá feløgum at avhenda rættindi, tá ið eigaralutfallið broytist. Um regluverkið kring avhending gerst ov stirvið, er vandi fyri, at tillagingin í vinnuni steðgar. Hetta er viðkomandi at vísa á ísv. viðgerð av hesum uppskoti, ið snýr seg um treytir fyri avhending og brúksskyldu.

Vinarliga,

Stefan í Skorini, stjóri

Føroya Reiðarafelag